# Fyrilestur um tannáringar

Týskvøldið 28. oktober klokkan 19.30 verður áhugavert kvøld fyri foreldur at tannáringum á Klaksavíkar bókasavni. Tá heldur Kathrina Lindenskov Joensen, sálarfrøðinguri, fyrilestur um tannáringar. Hon fer á fyrilestrinum at tosa um, hvat tað er, ið ger tað til nakað serligt at vera tannáringur. Kathrina Lindenskov Joensen nemir einamest við tey sálarligu viðurskiftini, men tann kropsliga menningin hevur eisini týdning fyri, hvussu tannáringar uppliva seg sjálvan, so tað kemur hon eisini inn á.



# Suðuroyarportalur nýtt snið

Í eina tíð hevur verið arbeitt við at dagføra Suðuroyarportalin á www.sudurras.fo, bæði hvat viðvíkur sniði og tí meiri tekniska partinum. - Hetta arbeiðið er nú komið somikið áleiðis, at vit á middegi í dag hava gjørt av at leggja nýggja Suðuroyarportalin út á netið, skrivar Suðuroyarportalurin í tíðindaskrivi. Nakrar av broytingunum eru longu sjónligar, men eisini aðrar broytingar verða gjørdar komandi dagarnar, sum vitjandi helst skuldu fingið gleði av. Tað er Cre8 - www.cre8.fo - í Klaksvík, sum hevur staðið fyri dagføringini av Suðuroyarportalinum.



FÍGGJARKREPPA
*Orð & myndir*
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*





# Læra av mistøkunum

**- Tað er eingin sum veit, hvussu veruliga støðan er enn, men tað er greitt, at vit hava gjørt mistøk. Teimum skulu vit læra av og brúka hesa læru at byggja upp ein sterkan íslendskan búskap, sigur Sigurjón Þór Hafsteinsson, stjóri í Smyril Line í Íslandi**



*Sigurjón Þór Hafsteinsson er stjóri í Smyril Line í Íslandi*

**Reykjavík:** Allir íslendarir eru samdir um, at fíggjarliga kreppan, sum hevur rakt landið, hevur rakt hart. Men eingin tykist vita enn, júst hvussu hart.

- Vit vita ikki, hvat fer at henda. Fleiri fyritøkur skylda nóg, men hvussu stórur skaðin verður ber ikki til at siga enn, sigur Sigurjón Þór Hafsteinsson, stjóri í Smyril Line í Íslandi.

Hann sigur, at Smyril Line sjálvandi eisini merkir kreppuna, sum kortini hevur eisini sínar positivu síðir.

- Vit eru nógv bookaðir eina tíð fram úr Íslandi, tí so nógvir póllendingar fara heim aftur. Hetta er fólk, sum antin eru uppsøgd, ella fara heim aftur, tí at tað stutt sagt ikki loysir seg at arbeiða í Íslandi longur, tí krónan er so lág, sigur Sigurjón Þór Hafsteinsson.

Hann sigur, at nógv fólk hava mist eina rúgvu av pengum, og at tey nú eru ørðkymlað av støðuni, tí tey kenna hana ikki.

- Fólk vistu ikki, hvussu bankarnir arbeiddu, serliga uttanlands og tí kemur hetta rættiliga óvart á, tað sum nú er hent, sigur Sigurjón Hafsteinsson.

## Byggivinnan eksploderað

Og at tað hevur gingið við rúkandi ferð seinastu árini. Byggingin hevur nátt óánaðar hæddir, og íbúðar- eins væl og ídnaðarbyggjarí er eksploderað.

- Í 2004 vóru tað 1500 fólk, sum arbeiddu í íslendsku byggivinnuni, nú kreppan rakti, var talið komið upp á 3700. So stóruru hevur vøksturin í byggivinnuni verið seinastu árini, sigur Sigurjón Hafsteinsson.

Men størri tú ert, harðari er fallið, og nú er so at siga alt byggjarí steðgað.

- Nú er ógvuliga lítið eftir. Mestsum alt tað privata er steðgað upp, og bara byggjaríir hjá landinum halda fram, sigur Sigurjón Hafsteinsson.

Eitt nógv umrøtt byggimál er sonevnda Tónleikahúsið, sum eitt dóttirfelag hjá Landsbankinn og eitt annað sum heitir Nýsir hevur í gerð. Tann byggingin er í gongd, men vit vita ikki, hvussu verður við tí. Tað skuldi verða liðugt í 2009, men vit vita nú, at verkætlanin verður seinkað, og Sigurjón Þór Hafsteinsson veit ikki at siga, hvussu verður við tí bygginini.

## Púra galið

Eingin tykist duga at siga, hvussu langa tíð tað fer at taka íslendingum, at sleppa úr kreppuni aftur, og tað dugir Sigurjón Þór Hafsteinsson heldur ikki.

- Tað er ringt at siga, serliga tí vit hava ikki fulla yvirlitið yvir støðuni enn, sigur hann.

Men tað er einki annað at gera, enn at byggja búskapin upp aftur av nýggjum. Og tá ræður um at hava lært av teimum mistøkum, sum gjørd eru.

- Vit kunnu bara hyggja at, hvussu bankarnir hava arbeitt. Lønirnar vóru púra ørar og høvdu einki við veruleikan at gera, og nógv vistu av hesum, sigur Sigurjón Hafsteinsson.

So sum støðan er nú, er bara eitt at gera.

- Vit mugu arbeiða okkum burtur úr kreppuni. Vit hava gjørt stór mistøk, og vit mugu læra av okkara feilum. Vit skulu brúka hesa læruna til at byggja samfelagið upp aftur, sigur Sigurjón Þór Hafsteinsson.

## Einki so ringt...

Men íslendingar eru samdir á í hvussu er einum øki: Teir síggja ljóst upp á framtíðina.

- Ísland er í løtuni nógv áhugaverdari sum ferðamannaland, tí tað er bíligt hjá ferðafólkum. Nógv fólk ringja t.d. og bíleggja sær eitt Rolex ur her, tí tey eru helvtina bíligari í Íslandi nú, enn í teirra heimlondum, sigur Sigurjón Þór Hafsteinsson.

Íslendingar hava eisini nógvar aðrar fyrimunir, ikki mist náttúrligu orkukeldurnar. Og fiskin í havinum. Og ikki at gloyma menniskjaliga tilfeingið.

- Vit hava nógv og væl útbúgvið fólk, sum hava verið í bankasektorinum, og sum nú eru leys á marknaðinum. Tað ræður um at útnytta hesi fólk, so vit skjótast gjørligt koma okkum úr kreppuni aftur, sigur Sigurjón Þór Hafsteinsson.

Meðan Smyril Line á sín vís hevur notið got av kreppuni við øktum bookingum av landinum, so veit Sigurjón Þór Hafsteinsson ikki at siga, hvussu stendur til við frakt til og úr Íslandi. Tað er Smyril Blue Water, sum skipar fyri tí.

# Merkja neyvan nakað

**- Vit flyra so mikið lítið av farmi til Íslands framman undan, at vit neyvan fara at merkja nakað til kreppuna í Íslandi, sigur John Frandsen, skrivstovustjóri hjá Smyril Blue Water**

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Vit flyta ikki serliga nógvan farm til Íslands. Tað allarmesta fer um Reykjavík á vesturlandinum, og Norröna siglur sum kunnugt upp á Seyðisfjørð á eysturlandinum, sigur John Frandsen, skrivstovustjóri á Smyril Blue Water.

Tað hevði sjálvandi latið seg gjørt at flutt um Seyðisfjørð til Reykjavík, men koyringini Íslandi er so mikið dýr, at tað als ikki loysir seg.

- Túrurin í næstu viku er hin seinasti í ár, og næstu fýra mánaðirnar sigla vit sostatt ikki upp á Ísland, so eg rokni neyvan við, at vit fara ar merkja kreppuna yvirhøvur, sigur John Frandsen.

Hann sigur, at teir ikki merktu nakran mun á fraktini í síðstu viku, og hvussu tað verður komandi viku veit hann ikki.

- Tað kann jú vera, at tað standa nakrir bilar og bíða í Seyðisfirði. Tað hoyrist jú, at tað ber til at fáa bíligar bilar í Íslandi í hesum døgum. Trupulleikin er bara tann, at talan er um sera stórar og bensinslúkandi bilar, so spurningurin er, hvussu bíligt tað verður í longdini, sigur John Frandsen.

Um nakað so fer at merkjast, tá Norröna tekur upp siglingina til Íslands aftur, kann bara tíðin vísa.




*John Frandsen trýr ikki, at íslendska fíggjarkreppan fer at ávirka virksemið hjá Smyril Blue Water*